# SERNÁMSDEPILIN

## Sálarfrøðingur í NSR tænastuni í Eysturoy

**Í Sernámsdeplinum er eitt sálarfrøðistarv leyst til setan 1. september 2007 ella skjótast tilber.**

Dagliga tænastustaðið er í NSR tænastuni í Eysturoy, Glyvravegur 10 B, Glyvrar.

**NSR tænastan** er eitt samtak ímillum Sernámsdepilin og Runavíkar-, Nes-, Sjóvar-, Leirvíkar-, Gøtu- og Fuglafjarðar kommunur. NSR tænastan virkar sum sjálvstøðugur stovnur undir Sernámsdeplinum og veitir skúlum, stovnum, foreldrum og myndugleikum námsfrøðiliga- og sálarfrøðiliga ráðgeving.

Høvuðsuppgávan hjá NSR tænastun er at kanna førleikastøðu og læruumstøður hjá børnum við serligum tørv og at ráðgeva í skipan av undirvísingarligum- og mennandi tiltøkum fyri hesi. Manningin í NSR tænastuni er ein samskipari, ein sálarfrøðingur og 3 serlærarar/ráðgevar

Sálarfrøðingurin, ið vit sóknast eftir, hevur ein týðandi lut í hesum toymi, ið í samstarvi við Sernámsdepilin støðugt skal menna sernámsfrøðiliga virksemið.

**Útbúgvingarkrøv og eginleikar**

- Cand. ped. psyk./ cand. psyk. – ella samsvarandi. Fyrimun hevur umsøkjari, ið hevur arbeitt við børnum.
- Fakligan førleika og hug at arbeiða bæði við kliniskt – psykologiskum og pedagogiskt – psykologiskum uppgávum.
- Duga at nýta kanningarúrslit í ítøkiligum undirvísingar – og viðgerðartilmælum.
- Hava hug og evni til neyvt samstarv við aðrar fakbólkar.
- Vitan um nervasálarlig greiningaramboð er eisini ein fyrimunur.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Hans Eli Dahl, stjóra, tlf. 314522/ 225803, (e-mail hanseli@snd.fo) ella Hans Jón Juul Thomsen, samskipara, tlf. 239190, (e-mail hjt@nsreystur.fo)

Umsókn við avriti av próvskjølum v. m. skal vera Sernámsdeplinum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin tann 3. august 2007 og skal sendast til:

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 · Postrúm 2036
FO 165 Argir
Tlf. 314522 – Fax 310196
e-postur: sernamsdepil@snd.fo

# Mazda Premacy
til sølu

Ein Mazda Premacy diesel frá 2001 til sølu. Bilurin er myrkabláur og er í góðum standi.

Áhugað kunnu ringja á 222081




Hvønn dag í juli mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnina innan mikudagin 8. august 2007 kl. 10.00 og viðmerkið brævbjálvan »Sudoku«.

Vinningur í juli er 2 M-semiflex flogferðaseðlar við Atlantic Airways. Virði Kr. 6.304,-

Drigið verður aðru vikuna í august.

Fyri at vera við í kappingini, skal øll uppgávan verða loyst.



## JULI-KAPPINGIN

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | 3 | 5 | | 8 | 2 | | |
| | | | | | | | | |
| 1 | | | | 9 | | | | 7 |
| | 6 | | 1 | 8 | 9 | | 4 | |
| | 5 | | 7 | | 3 | | 9 | |
| | 9 | | 4 | 6 | 5 | | 1 | |
| 7 | | | | 5 | | | | 4 |
| | | | | | | | | |
| | | 8 | 6 | | 1 | 3 | | |

ATLANTIC AIRWAYS

Navn:________________

Bústaður:________________

Telefon:________________

Sendið til: Sosialin · Boks 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan »Sudoku«

**Vinningurin í juli**

2 M-semiflex ferðaseðlar frá Atlantic Airways. **Virði Kr. 6.304,-**

SUDOKU

Sosialurin